KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 16.05.2024 kl. 17:30 |
| **Málnr.:** | 21/01365 Gerðabók |
| Nevndarlimir: | Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Annika S. Biskopstø |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Oddmar á Lakjuni |
| Onnur: | Rúni Rasmussen, kommunustjóri |
| Protokollførari: | Anna Berg, skrivari |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 36/24 | 24/00531-18 | Tilmæli um eykajáttan til at skifti graslíkið við Djúpumýru |

**Til viðgerðar**

## 36/24
## 24/00531-18 Tilmæli um eykajáttan til at skifti graslíkið við Djúpumýru

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.05.2024 | 33/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 16.05.2024 | 36/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | |

## 24/00531-18 Umsókn um nýtt graslíki við Djúpumýru - Klaksvíkar Ítróttarfelag

**Frágreiðing um málið:**
Avgerð er tikin um at skifta graslíkið við Djúpumýru. Hetta arbeiðið verður gjørt í juni (vika 25).

Vøllurin við Djúpumýru er sera slitin. Klaksvíkar kommuna varð í 2023 gjørd varug við, at vøllurin var slitin. Mett var tá, at vøllurin kláraði eitt kappingarár afturat, men hetta hevur víst seg ikki at vera so. Umbøn kom frá Klaksvíkar Ítróttarfelag 29. apríl um at skifta vøllin vísandi til nógv slit (sí viðfest fylgiskjal).

Víst verður eisini til, at ein EM U17-kapping hjá kvinnum skal spælast á vøllinum í mai 2025. Ein heildarmeting sigur, at lagaligasta tíðin at skifta graslíkið er í juni í ár (vika 25).

Ein møguleiki er at fíggja ein part við at flyta játtanina á 500.000 kr. frá Ung í arbeiði (03241270045) til Ítróttarøkið, íløga (05246270192).

**Burðardygd og heimsmálini:**
Heimsmál nr. 3: Góð heilsa og vælferð.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið er mett til at kosta 4,6 mió kr. (nýtt graslíki og burturbeining av verandi, gjøgnumgongd og góðkenning av undirlagi og graslíki).
Klaksvíkar kommuna fær stuðul á 600 tkr. frá FSF.
Útreiðslan hjá Klaksvíkar kommunu verður 4 mió kr.
Mælt verður til, at útreiðslan verður fíggjað við *tøkum peningi*.

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevnd og býráð at taka støðu til tilmælið.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2024:**
*Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni*
Nevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til, at upphæddin á 4 mió kr. verður fíggjað við tøkum peningi. Nevndin mælir til, at gamli vøllurin verður burturbeindur beinanvegin.

**Klaksvíkar Býráð 16. mai 2024:**
*Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini vegna ógegni*
Atkvøtt varð um tilmælið frá FíN 16-05-2024, tað var samtykt við fyrstu viðgerð, við 6 atkvøðum fyri (JCC, GvK, ASJ, KHJ, JS og ÓML) og 1 atkvøðu ímóti (ASB), og SVJ atkvøddi blankt.

*Fundurin lokin kl. 18.00*